# Nýtt handilshús reist í Vági

Leygardagin vórðu sperrurnar til nýggja handilsbygningin, Torgið, í Vági reistar. Tað eru Arni D. Brattaberg og Rakul Borg, sum standa aftanfyri Torgið, har m.a. ein stórur matvøruhandil skal húsast.Arni D. Brattaberg sigur, at byggingin gongur sum ætlað, og tey vænta at lata upp í vár. Í handilsbygninginum verða umframt tann stóri matvøruhandilin eisini aðrir handlar. Sum er, er eingin stórur handilsbygningur í Vági, so hetta kemur væl við hjá íbúgvunum í syðru helvt av Suðuroynni.



# eiri enn nakrantíð







arvøkstri og eini búskapargongd, sum hevur gjørt tey allar flestu av okkum til eina stóra miðalstætt. Vælferðarstaturin er etableraður, og tað vil eingin flokkur broyta nakað uppá. Flokkarnir renna aftaná eini veljarafjøld, sum ikki longur er eins eyðkend av interessumótsetningum, og tí gerst miðsavningin so sjónlig, sigur Jógvan Mørkøre.

Tann stóra broytingin er, at meðan flokkarnir fyrr umboðaðu ávísar partar av veljaraskaranum, kappast allir flokkarnir í dag um allar veljararnar. Kjarnuveljarin er skiftur út við marginalveljaran, og tann sonevndi "Catch all"-flokkurin hevur av sonnum fingið gjøgnumbrot í Føroyum.

## Valstríð uttan innihald

Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðingur og Ph.d.-lesandi, metir, at tá flokkarnir ikki hava ítøkiligar fíggjarligar raðfestingar, gerst valstríðið innihaldsleyst.

- Ein valskrá, sum einans sigur, at alt skal broytast til tað betra, sigur akkurát einki. Tá flokkarnir ikki so mikið sum ómaka sær at rokna uppá tey mongu og gyltu vallyftini, sum í hesum døgum bombarderað føroyska veljaran, er talan um ábyrgdarleysa populismu, sigur Jóannes Jacobsen úr telefonini í Keypmannahavn.

Eitt og hvørt vallyfti kostar, og um okkurt skal raðfestast hægri enn í dag, so skal okkurt eisini niðurprioriterast. Jóannes saknar, at politisku flokkarnir verða tvingaðir at koma við ítøkiligari raðfestingum. Og tað eru fjølmiðlarnir, sum eisini hava ábyrgdina.

- Politikarar gera tað, sum teir sleppa avstað við, og tá fjølmiðlarnir ikki forlanga greiðari boð um ítøkiligar raðfestingar, so hava teir eisini ábyrgdina av trupulleikanum. Fyrsti spurningurin til eina og hvørja valskrá ella vallyfti átti at verið, hvussu hetta ella hatta skal fíggjast, og hvaðani pengarnir skulu fáast til vega. Men tað spyrja føroyskir journalistar alt ov sjáldan um, og tí er úrslitið fullkomiliga veruleikafjarar og ullintar kampanjur uttan nakað fokus, sigur Jóannes Jacobsen. Hann metir av tí sama, at valstríðið higartil hevur verið innihaldsleyst, tá veljarin ikki ítøkiliga fær at vita, hvør flokkur ætlar at raðfesta hvat.

## Fáið ósemjurnar á breddan!

Við hesum í huga er tað spell, at tey málini, sum framvegis skilja partarnir í føroysku floksskipanini, ikki hava verið serliga dominerandi í valstríðnum higartil. Í staðin verður eitt hav av tíð og orku nýtt til evni, sum øll eru so eviga samd um. Og einki er keðiligari enn at lurta eftir seks flokkum, sum við ein munn siga, at mentan, útbúgving, umhvørvi, heilsuverk, eldrarøkt, vælferð og bla bla bla skal raðfestast komandi fýra árini.

Hví ikki taka fatt í teir spurningar, sum av sonnum skilja flokkarnar? Sum t.d. fiskiloyvini, skattalættan, skrásett parlag, fosturtøku og allan spurningin um loysing ella samband, sum heldur ikki hevur verið serliga sjónligur í valstríðnum higartil? Okkurt av hesum evnum var lukkutíð uppi at venda á valfundi Kringvarpsins í Klaksvík sunnukvøldið, og tað var eitt satt ljóspunkt í valstríðnum higartil (hóast umfarið um javnstøðu, átrúnað og etiskar spurningar ongantíð kom í gongd).

Samanumtikið er tað spill av tíð og orku at seta evni á breddan, sum allir flokkar eru so samdir um. Heldur áttu vit at nýtt tíð til tað, sum av sonnum skilir flokkarnar, so politisku positiónirnar ikki hvørva heilt í eini tíð, sum er eyðkend av miðsavning og konsensus um teir flestu av teimum stóru avbjóðingunum, sum samfelagið stendur yvir fyri.

*- Politikarar gera tað, sum teir sleppa avstað við, og tá fjølmiðlarnir ikki forlanga greiðari boð um ítøkiligar fíggjarligar raðfestingar, so hava teir eisini ábyrgdina av trupulleikanum. Fyrsti spurningurin til eina og hvørja valskrá ella vallyfti átti at verið, hvussu hetta ella hatta skal fíggjast, og hvaðani pengarnir skulu fáast til vega. Men tað spyrja føroyskir journalistar alt ov sjáldan um, og tí er úrslitið fullkomiliga veruleikafjarar og ullintar kampanjur uttan nakað fokus*

*Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðingur*

*- Gongdin er fyrst og fremst eitt úrslit av eini búskapargongd, sum hevur gjørt tey allar flestu av okkum til eina stóra miðalstætt. Vælferðarstaturin er etableraður, og tað vil eingin flokkur broyta uppá. Flokkarnir renna aftaná eini veljarafjøld, sum ikki longur er eins eyðkend av interessumótsetningum, og tí gerst miðsavningin so sjónlig*

*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur*